## Alti og teir bara tapa

Danska 1. Deildarfelagið Frem tapti um vikuskiftið enn ein venjingardyst. Hesaferð spældi Frem í Roskilde, og tað var heimaliðið, sum vann dystin 3-1. Í hálvleikinum var støðan 0-0. Roskilde legði seg á odda 1-0, áðrenn Emil Jensen javnaði fyri Frem. Men so skoraði Roskilde tvey mál afturat og vann dystin. Atli Danielsen var eykamaður, men hann varð sendur á vøllinum longu eftir 10 minuttir, og hann spældi restina av dystinum á miðvøllinum.



## Stjørnurnar halda fram

Stjórin í enska felagnum Chelsea vísir aftur, at stjørnuspælararnir Didier Drogba og Frank Lampard eru á veg úr felagnum. Ensku fjølmiðlarnir hava annars dúliga skriva um hetta, og spælararnir sjálvir hava latið onkur orð falla um, at teir kundu hugsa sær at skift felag. Peter Kenyon sigur, at Lampard hevur eitt ár eftir av sínum sáttmála, og Drogba hevur tvey ár eftir. Men felagið ætlar at gera nýggjar sáttmálar við teir.

Neistin-VÍF 28-18 (12-9):

# Neistin vil hava finalusessin

**Høllin á Hálsi var leygardagin karmur um dyst í Sunset-kappingini, og tað var Neistin, ið tók móti VÍF. Við vissuni um týdningin av einum sigri, byrjaðu vertirnar øðiliga væl og løgdu seg alt fyri eitt væl á odda**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*VÍF fekk ongan tíð fatur á Neistanum, sum punkteraði tað mesta av spenninginum longu fyrstu løtuna av dystinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Góða byrjanin hjá Neistanum tóktist leypa hvøkk á gestirnar úr Vestmanna, og tær stríddust at koma upp móti havnaliðnum aftur. Men longu eftir 13 teimum fyrstu minuttunum var støðan heili 7-1 til Neistan, og tá sigur tað seg sjálvt, at tað gerst ein long mótbrekka hjá liðnum, ið aftanfyri er. Neistin vann tryggan 28-18 sigur móti VÍF, eftir hálvleiksstøðuna 12-9. Sigurin hevur við sær, at Neistakvinnurnar nú liggja ájavnt við VB, og hava ein heimadyst móti Vágskvinnum, og hann kann fara at vera rættuliga avgerandi fyri, hvørt av hesum skal møta Stjørnuni í finaluni um FM.

### Skansin í VÍF málinum

VÍF eigur ein rættuliga góðan málverja í Tommu Petersen, og við henni á odda vunnu tær gulu seg alt nærri og nærri heimaliðnum.

So væl var tað byrjað at gangast VÍF, at Tomma nærum tók alt móti endanum av fyrsta hálvleiki, og kontrarenningin virkaði til fulnar. Tó komu tær einans upp til støðuna, har trý mál vóru á muni, áðrenn dómararnir bríkslaðu fyri hálvleiki.

### Góð byrjan avgjørdi

Beinan vegin í øðrum hálvleiki, byrjaði góða gongdin hjá Neistanum aftur, og tá var í roynd og veru avgjørt.

Eins og í fyrsta hálvleiki, byrjaði Neistin sum eitt óløgið í øðrum hálvleiki, og fyrstu tíggju minuttirnar skoraðu bláu havnagellurnar sjey ferðir. Hetta tóktist vera mønustingurin hjá VÍF.

Besti málskjútti hjá Neistanum var Ása á Neystabø við sjey málum, meðan Ioana Rapa somuleiðis skoraði sjey mál fyri gestirnar.

### FAKTA

**Neistin-VÍF 28-18 (12-9)**
10 min: 5-1
20 min: 9-5
40 min: 19-11
50 min: 23-14
**Málskjúttar**
**Neistin**: Ása á Neystabø 7, Rakul Augustinussen 5(2), Anja Heinadóttir 4, Unn J. Kragesteen 4, Nicoleta Radu Hansen 3, Ása Christiansen 2, Elin Stakksund 2, Katrin á Neystabø 1
**Stjørnan**: Ioana Rapa 7(1), Liljan Djurhuus 5(1), Heidi Joensen 3, Linda Johannesen 1
**Brotskøst**: Neistin 2, VÍF 3
**Útvísingar**: Neistin 5, VÍF 3
**Dómarar**: Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

### Stuttligt at spæla í dag

Vit fingu fatur á Unn Kragesteen beint eftir dystin í høllini á Hálsi um vikuskiftið, og hon hugleiddi um dystin.
*Hvussu vil tú lýsa dystin?*
Hetta var ein ómetaliga stuttligur dystur at spæla. So gott sum alt gekk eftir vild, og serliga verjan fangaði alt sum kom móti. Vit fingu av tí sama, eina sera góða byrjan, og vóru frammanfyri 7-1 eftir bert 13 minuttir.
*VÍF komu betur við, hvat hendi hjá tykkum tá?*
Serliga málverjin hjá VÍF, Tomma Petersen stóð ein branddyst, og hon pílaði okkum niður, tað einu løtuna. VÍF- leikararnar fingu sjálvsagt nýtt dirvi, og tí komu tær eitt sindur nærri. Men heilt nær komu tær tó ongantíð. Vit høvdu tamarhald á støðuni, sigur Unn.
*Nú eru tit ájavnar VB á øðrum plássi. Hvussu eru vónirnar til finalusessin í FM?*
Vit mugu og skulu vinna hvønn dyst, frá nú av, skulu okkara finaluvónir vera lívi lagaðar, og tískil er hvør einasti dystur sum ein finala, sigur Unn Kragesteen at enda, ið annars hevur góðar vónir til, at tær fara at klára tað.

**-niels**

### Gev okkum ein møguleika afturat

Sambært Ioanu Rapa má unga VÍF liðið vinna sær meiri royndir í Sunset-kappingini. Hon metir, at Hondbólts Samband Føroya (HSF), eigur at umhugsa at lata VÍF vera verandi í deildini, og eisini lata nummar eitt í fyrstu deild flyta upp, so at man á tann hátt hevur eitt lið afturat í bestu kvinnudeildini í komandi kappingarárum.
- HSF eigur at lata okkara lið vera verandi í deildini, tí eg meti at vit eiga at hava eitt lið afturat í bestu kvinnudeildini.
- Vit hava í ár víst, at vit aloftast bert hava tapt við fáum málum, og at munurin sum heild hevur verið lítil. Tískil vil eg staðiliga heita á HSF, um at umhugsa tankan um at víðka bestu kvinnudeildina við einum liði. Tað er tað pláss fyri, um bert viljin er til staðar, sigur ein hugsunarsom Ioana Rapa, sum í mong ár hevur verið ein væla hondbóltsleikari á hægsta støði.
Ioana Rapa segði eisini aftaná dystin, at hon metir at Tomma stóð sera væl, men trupuleikin var heldur, at útileikararnar ikki hildu avtalurnar, og livdu tískil ikki upp til stórspælandi Tommu.

**-niels**

